# Góðska á feskum fiski frá føroyskum skipum



## Støðulýsing

Februar 2017


Símun Hammer,
*Fiskivinnufrøðingur*

# Støðulýsing av feskum fiski, landaður í Føroyum.

## INNIHALDSYVIRLIT


Støðulýsing av góðsku á ísaðum fiski frá føroyskum skipum. ..... 2
Bakgrund og endamál ..... 2
Góðska ávegis til endabrúkaran ..... 2
Gjøgnumføring ..... 3
Innvigingarskipanir í Føroyum ..... 3
Góðskumenning seinastu 15 árini ..... 3
Týðandi grundreglur í veiðuliðinum fyri at tryggja góða góðsku ..... 3
Útbløðing ..... 3
Ísing av fiskinum umborð á bátunum. ..... 4
HFS kanningar í 2012 ..... 4
Munurin á hesi kanningini og kanningum hjá HFS ..... 5
Nýttur greiningarháttur ..... 5
Dátugrundarlag ..... 5
Greining av tølum frá FMF ..... 6
Samanbering av bátum innan hvønn skipabólk (benchmarking.) ..... 10
Kanningar og vitan frá feløgum og persónum á føroyska marknaðinum ..... 11
Úrslit frá samrøðum við persónar og feløg á føroyska feskfiskamarknaðinum. ..... 12
Gongdin í tølum – í Føroyum og aðrastaðni. ..... 15
Úrslit á saltfiskamarknaðinum ..... 17
Niðurstøður frá samrøðum við fiskaframleiðarar og seljarar ..... 17
Pelagiska vinnan ..... 18
Umrøða av úrslitum ..... 18
Góðskutap í virði í mun til dagalongd. ..... 18
Góðskutap í virði í mun til bestu prísir í ymisku skipabólkunum ..... 19
Góðskutap sambært samrøðum við aktørar í vinnuni ..... 20
Samandráttur ..... 20
Nakrar samanfattandi niðurstøður um støðuna í dag ..... 22
Tilvísingar ..... 23
Fylgiskjøl ..... 24
Fylgiskjal 1: Tølini, ið liggja til grund fyri útrokningunum í talvu 2. ..... 24

# Støðulýsing av góðsku á ísaðum fiski frá føroyskum skipum.

## Bakgrund og endamál

Áhugin fyri øktari virðisøking í føroysku fiskivinnuni, hevur leingi verið til staðar. Tá ið talan eru um eitt avmarkað tilfeingið pr. ár, kann virðisøking einans fáast gjøgnum betri markndarprís fyri verandi vørur, ella við at gagnnýta størri part av fiskinum (alt til lands).

Til tíðir verður sagt at góðskan á ísaðum fiski frá føroyskum skipum er versnað støðugt seinastu árini, og at tað loysir seg ov lítið at leggja seg eftir, at avreiða høga góðsku. Hendan kanning hevur tí lagt seg eftir at kanna og lýsa støðuna á góðskuni frá feskum fiski, sum verður avreiddur í Føroyum í dag.

Endamálið við kanningini hava vit tí orða soleiðis:

a) Geva eina støðulýsing, av góðskuni á ísaðum fiski frá føroyskum fiskiførum, býtt á fiska- og skipasløg og prísstøðið í mun til góðsku. Síðsti parturin av endamálsorðingini leiðir til fylgjandi deilendamál:
b) Lýsing av prísinum og samlaðu inntøkunum í dag fyri feskan ísaðan fisk frá føroyskum skipum, og lýsing av hvørjar inntøkurnar møguliga kundu verið um góðskan var ein onnur.

### Góðska ávegis til endabrúkaran

Frá tí at ein fiskur er fiskaður, til hann nær fram til endabrúkaran, skal hann vanliga gjøgnum nógv lið. Tað lúra tí nógvir vandar á vegnum, ið kunnu gera góðskuna á fiskinum verri á vegnum fram til brúkaran. Tó má tað eisini viðurkennast, at góðskan á fiskinum ongantíð kann gerast betri á veg fram til brúkaran. Handfarin frá 1 liðinum, sum er viðgerin eftir at fiskurin er fiskaður, hevur tí alstóran týdning á endaligu góðskuna á vøruni.




*Mynd 1: Høvuðslið, har fiskur vanliga verður handfarin frá fiskiskapi til endabrúkara*

Í okkara dømi omanfyri, skal fiskurin gjøgnum 4 høvuðslið á vegnum fram til endabrúkaran. Hvørt høvuðslið í mynd 1 omanfyri, kann hava fleiri deil lið, sum eisini eru kritisk fyri góðskuna á ferska fiskinum.

## Gjøgnumføring

Kanningin er gjøgnumførd yvir 2½ mánað, sum í sjálvum sær er rímiliga avmarkandi. Dentur hevur tí verið lagdur á, at fáa íkast frá fleiri aktørum og við útvegan av dátagrundarlagi, so ein mynd fæst av heildarstøðuni á føroyska marknaðinum í dag.

## Innvigingarskipanir í Føroyum

Móttøkan av feskum fiski í Føroyum fer fram á ymsum støðum kring landið. Tá fiskur verður seldur / keyptur alment, fer hetta fram um sonevndar løggildar innvigingarskipanir.  Í Føroyum eru 31 slíkar innvigingarskipanir, har tær flestu verða brúktar í samband við keyp og sølu av fiski, meðan aðrar verða brúktar til avskipingareftirlit og vektareftirlit annars.

## Góðskumenning seinastu 15 árini.

Í árunum 2001 – 2002 gjørdi Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (HFS), kanningar, fyri at fáa eitt yvirlit yvir støðuna viðvíkjandi ráfiskinum í Føroyum. Endamálið var m.a. at geva skipum afturmelding um støðuna, og fyri at handhevja §5, stk. 3-5, í kunngerð nr. 122 frá 24. august í 2001.

Hetta var samstundis eisini gjørt fyri at leggja eitt støði fyri, løggilding av landingarmiðstøðum, soleiðis at tær sjálvar undir neyvum eftirliti av Heilsufrøðiligu starvsstovuni (HFS) kundu útinna hetta arbeiðið sambært kunngerð nr. 122, §5, stk. 3.

## Týðandi grundreglur í veiðuliðinum fyri at tryggja góða góðsku

Grundleggjandi, setur  Kunngerð nr. 161 frá 18. desember 1995 um heilsufrøðiligan rakstur, viðgerð av fiski og fiskaúrdrátti og løggilding av fiskiførum fleiri krøv, ið fiskifør skulu liva upp til, fyri at føra eina trygga matvøru til lands. Týðandi liðir eru m.a.: Blóðging, úttbløðing í sjógvi áðrenn kryvjing. Kryvjing/reinsing, skjót køling, leggja fiskin við búkinum niðureftir og ísing.

## Útbløðing

Ein týdningarmikil partur av hagreiðingini er, at fiskurin verður væl útbløddur.

Sambært §6 í kunngerð nr. 161 frá 1995 skal fiskurin beinanvegin blóðgast, kryvjast og vaskast við reinum vatni, soleiðis at ongar garnarestir eru eftir. Útfrá kanningunum vóru tað serliga ávísir partrolarar, sum høvdu størstu trupulleikarnar við útbløðing, og var orsøkin til hetta helst, fyrst og fremst, at hálini eru ov stór og long til tíðir. Hetta førir við sær, at stórur partur av fiskinum doyr, áðrenn hann verður blóðgaður ella kruvdur.

Ein annar trupulleiki er, um fiskurin ikki bløðir út nóg leingi, áðrenn hann fer í lastina.

Hjá línubátunum, snellubátunum og trolbátunum var eftir kanningini at døma ikki stórvegis trupulleikar á hesum økinum.

## Ísing av fiskinum umborð á bátunum.

Nevnda kanningin í 2001-2002 vísti eisini at uml. 50% av bátunum høvdu ov lítlan ís í kassunum í mun til fisk. Flestu kanningar vísa at besta góðskan fæst, um ísa verður við minst 40% av einum kassa, soleiðis at fiskurin bæði kann halda sær umborð, og upp til 2 dagar eftir at hann er komin á land. Um rætt verður ísað, eiga 15-20% av ísi at vera eftir í kassanum í samband við landing.

Sum heild vísti kanningin, at fiskurin var á einum væl hægri støði enn tað, sum hann var áður (t.d. í áttatiárunum). Men tað vóru tó nøkur viðurskifti hjá nøkrum veiðuførum viðvíkjandi hagreiðingini, sum ikki liva upp til krøvini í kunngerðunum.

Hesi viðurskifti vóru fyrst og fremst hesi:

1. leysur fiskur (burtursæð frá tí, ið er hagreiddur sambært reglugerðunum),
2. ísing (serstakliga um summarið): Kanningin vísti at ísing serliga var ein trupulleiki um summari.
3. merking í mun til dagalongd (nær fiskurin var fiskaður)
4. ov nógvur fiskur í køssunum,
5. vasking av fiskinum og
6. samdøgurslisti.

## HFS kanningar í 2012

HFS ger regluligar kanningar / vitjanir av virkjum og skipum, sum landa og við atliti at løggilding. Í 2012 -2013 eru nakrar miðvísar kanningar gjørdar, sum vit hava fingið innlit í. Hesar kanningar vísa, at viðurskiftini, sum HFS heldur eyga við, smb. kunngerðunum, eru heldur frægari nú, enn í 2012. Niðanfyri sæst ein samanbering av kanningarúrslitunum frá 2002 og 2012-2013.

| **HFS kanning 2002** | **HFS kanning 2012 - 2014** | **Gongdin** |
|---|---|---|
| 1. Leysur fiskur í krubbum, (burtursæð frá tí, ið er hagreiddur sambært kunngerð 161, frá 18/12/1991 §8). | Leysur fiskur ísv nógv fiskarí. Partur ikki egnaður til matna. | → |
| 2. Ísing (serstakliga um summarið): Kanningin vísti at ísing serliga var ein trupulleiki um summari. | Ísprosentið í lagi í uml. 60% av kanningunum. | ↑ |
| 3. Merking í mun til dagalongd (nær fiskurin var fiskaður) | Støðugur bati. Kemur ikki ofta fyri at hetta ikki er í lagi. | ↑ |
| 4. Ov nógvur fiskur í køssunum, | Lítil bati. Yvirhøvur ov nógv í kassum og kørum | → |
| 5. Vasking av fiskinum | Var í lagi á øllum kanningum | ↑ |
| 6. Samdøgurslisti. | Ikki nevnt í kanningini. | N/A |
| 7. Ikki nevnt í kanningini | Fiskur lagdur við búkinum niðureftir | N/A |

*Talva 1: Samanbering av HFS kanningum í 2001-2003 og 2012-2014*

↑= Framgongd → = Á leið sama støði sum í 2002 (meting) N/A = Ongin samanbering

*Ein nokk so vanlig viðmerking í kanningunum frá HFS er, at munur er frá skipi til skip.*

### Munurin á hesi kanningini og kanningum hjá HFS

Tað er vert at nevna, at endamálið við kanningunum hjá HFS er fyrst og fremst at tryggja, at fiskurin er egnaður til mannaføði, smb. §5 stk.3 í kunngerð 122 frá 2001. Kanningar hjá HFS hava tí ikki sum eitt endamál, at vísa á góðsku í mun til tey krøv kundar seta.

Hendan kanning, sum nú fyriliggur, hevur sum endamál at lýsa góðskuna á feskum fiski, í mun til tey krøv kundarnir seta. Tá talan er um marknaðartreytir, har kundin avgerð góðskuna, verður serliga tosað um fylgjandi eginleikar:

1. Litur
2. Brot
3. Konsistensur
4. Smakkur

Grundleggjandi skal fiskurin tó altíð vera egnaður til matna. Tað eru tí í høvuðsheitum somu viðurskifti, sum nevnd eru undir talvu 1 omanfyri, sum hava týdning fyri at hesir 4 nevndu eginleikar eru til staðar í so stóran mun, sum gjørligt.

Í okkara kanning umrøða vit eisini túralongd, sum ein týðandi faktor í góðsku- og virðistapi á feska fiskinum, áðrenn hann nær út til endabrúkaran.

## Nýttur greiningarháttur

Í okkara greining av góðskuni á feskum fiski, hava vit lagt dent á 3 ymiskar kanningarhættir, hesir eru:

1. Samrøður við persónar í vinnuni, sum regluliga keypa ella veiða feskan fisk undir Føroyum.
2. Greining av dáta frá FMF í mun til prís og dagatal, har báturin/skipi hevur verið til fiskiskap – t.e. frá 1. fiskidegi og fram til landing.
3. Samanbering (benchmarking), har vit hava eyðmerkt bestu bátarnar í hvørjum skipabólki, og samanborið bátarnar í hvørjum skipabólki við tann besta bátin í bólkinum. Av tí at talan er um eina støðulýsing, hava vit mett, at tølini frá 2014 – 2016, t.e. 3 tey seinastu árini, eru nøktandi fyri at kunna staðfesta støðuna. Í stóran mun, hava vit bert nýtt tøl frá bátum/skipum, sum hava verið til fiskiskap gjøgnum øll 3 árini. Hetta er gjørt, fyri at taka hædd fyri at skip eru farin úr vinnuni, ella hava skift eigarar o.l.

### Dátugrundarlag

Ein høvuðskelda í okkara kanning eru tøl frá Fiskamarknaði Føroya, har vit hava fingið innlit í ymisk tøl, ið kunnu siga nakað um góðsku og prís.  Øll tøl frá FMF eru av okkum anonymiseraði, soleiðis at lesarin ikki hevur innlit í hvørjar vinnuligar aktørar, talan er um.

## Greining

Tá talan er um góðsku á kundamarknaðinum, hava vit mett tað verða virðismikið at gera nakrar samanberingar við ymsum fortreytum, út frá tí talgrundarlagi, ið vit hava fingið atgongd til frá FMF.  Niðanfyri vísa vit tí ymiskar støður, ið allir mugu metast at hava samband við góðsku og prís undir marknaðartreytum.

Sum eina byrjan, hava vit hugt eftir søluprísinum fyri Tosk 1 hjá øllum skipabólkum frá 2011-2016. Toskur 1 er her valt, fyri at samanberingin skal vera so eintýðug sum gjørlig, tá talan er um fiskaslag. Vansin er, at samanberingin fyri ávísar bólkar kann vera misvísandi, tí hesir ikki hava tosk, sum høvuðsveiðu – dømir um hetta eru garnaskipini.




*Mynd 2: Myndin vísir søluprísir fyri tosk 1 fyri ymiskar skipabólkar frá 2011 - 2016.*

Sum mynd 2 omanfyri vísir, so er týðiligur munur á prísinum á FMF yvir okkara 5 ára tíðarskeið. Her skal tó serliga hyggjast eftir bólkunum frá 2-5. Bólkur 2 hevur ikki tosk sum sína høvuðsveiðu. Sambært persónum og feløgum, sum vit hava samstarvað við í hesi kanningini, er høvuðsorsøkin munur á góðsku. Innan sama skipabólk eru eisini stórir munir, (sí mynd 3 niðanfyri). Fyri lemmatrolarar er talan fyri tað mesta um landingar frá Magnus Heinasyni, sum ger stuttar túrar, og vanliga fær ein góðan prís á fiskamarknaðinum.

Bólkarnir sum FMF nýtir í síni uppdeiling er:

| | |
|---|---|
| Bólkur 1: Lemmatrolarar | Bólkur 4A: Útróðrarbátar (15 – 40 BRT) |
| Bólkur 1.2: Garnaskip & partrolarar | Bólkur 4B: Útróðrarbátar (40 – 110 BRT) |
| Bólkur 2: Trolarar (vanliga pør) | Bólkur 4T: Trolbátar (størri enn 40 BRT) |
| Bólkur 3: Línuskip (yvir 110 BRT) | Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 BRT(5A og 5B) |




*Mynd 3: Myndin vísir miðal søluprísin hjá línubátunum í bólk 3, í tíðarskeiðinum 2011 - 2016. Nevnast skal, at nakrir bátar eru dotnir út so hvørt, tí teir eru seldir og loyvir løgd saman. Myndin vísir tó, at týðiligur munur er millum prísin, sum teir ymisk bátarnir fáa fyri vøruna á feskfiskamarknaðinum í Føroyum.*

Sum mynd 3 vísir, so er stórur munur millum línuskipini, sum fingu hægsta og lægsta meðalprís frá 2011 – 2016. Teir bestu liggja upp ímóti einum meðalprísi hesi árini á kr. 17,75 pr. kg. meðan teir við lægsta meðalprísinum, fingu kr. 11,42 pr. kg. Her skalt tó eisini havast í huga, at nakrir bátar ikki hava verið í vinnu øll árini, meðan frystilínuskipini bert avreiða feskt av og á. Hesi viðurskifti kunnu tí eisini ávirka miðalprísin.

Fyri at gera bátarnar meira samanberiligar, hava vit kannað prísin fyri feskan tosk 1 og 2 í 2016. Her sæst eisini at ávísir bátar fáa ein prís, sum er væl hægri enn aðrir. Lægsti miðalprísur hjá einstøkum báti er 18,02 meðan hægsti miðalprísur er 21,22 kr./kg. Tað skipið, sum avreiddi mest, fekk næstbesta prísin.




*Mynd 4: Miðalprísur fyri Tosk 1 og 2 á FMF, hjá ymisku línubátunum í bólki 3.2016. Myndin vísir eisini her týðiligan mun millum bátarnar. Frystilínuskipini eru ikki partur av hesi myndini.*

Fara vit longur inn í avreiðingarnar í mun til prís, og t.d. hyggja eftir prísinum fyri allan tosk í 2016 býtt út á línuskip í bólki 3 fáa vit fylgjandi mynd.




*Mynd 5: Vísir virði á landingum av øllum toski í bólki 3 í 2016. Her sæst bæði landa nøgd (vinstri akisur) og prísur (høgri akstur). Tey 9 línuskipini eru teir 9 stabbarnir.*

Mynd 5 vísir somu *tendensir*, sum mynd 4. Tó síggja vit, at tá allur toskur verður tikin við, fer miðalprísurin niðureftir. Ein orsøk til hetta kann vera lægri meðalprísur fyri smáan tosk.

Fyri at samanbera við bólk 3, hava vit hugt eftir bólki 4B, sum ofta verður sagdur at hava bestu góðskuna. Mynd 6 niðanfyri vísir bólk 4b, útróðrarbátar 40 – 110 tons fyri allar toskastøddir í 2016. Tað, sum sæst týðiligt í myndini er, at hóast tað eru 20 bátar í hesum bólki í 2016, so eru tað 4 av teimum, sum eiga omanfyri 80% av søluni hjá hesum bólki í 2016.




*Mynd 6: Vísir avreiðingarnar av øllum toski, hjá teimum 20 útróðrarbátunum í 4B (40-110 tons) fyri 2016. Landa kg. eru á vinstru síðu, meðan meðalprísur sæst á høgru síðu*

Sum mynd 6 omanfyri vísir er hægsti miðalprísur 17,39 kr./kg. í miðal, meðan besti bátur í bólki 3 fekk 17,54 kr. í miðal. Ein munur millum bólk 4B og bólk 3 (mynd 5) er at meðalprísurin millum teir 'aktivu' bátarnar í bólki 4B einans 0,71 kr./kg. í miðal fyri allar toskastøddir í 2016. Í bólki 3 (Línuskip) er prísmunurin væl størri millum teir bestu og vánaligastu (frá 17,5 – 15,2 kr./kg.)

## Landingarvirði í mun til túralongd

Hyggja vit eftir longd á túri í mun til meðalprís fyri allar landingar í bólki 3 á FMF fyri árini 2014-2016, fáa vit hesa myndina (mynd 7 niðanfyri). Munurin er góðar 5,5 kr. kg í miðal, tá fiskurin er 4-6 dagar gamal í mun til tá hann er 15-16 dagar gamal. Munurin millum 0 og 8 dagar er uml. 2,5 kr. Eftir hetta versnar munurin munandi.




*Mynd 7: Vísir meðalprís og veidd tons frá FMF í mun til túralongd, fyri línubátar í bólki 3. Tølini eru miðaltøl fyri 2014 - 2016. Fiskasløgini ið eru samanborin eru: Toskur, Hýsa, Brosma, Longa og Upsi.*

Síðan hava vit eisini hugt uppá, hvussu myndin sær út, um vit taka øll skip frá 2014-2016, og kanna kr./kg í mun til túralongdin. Tá fáa vit myndina niðanfyri.




*Mynd 8: Prísur (kr./kg.) í mun til túralongd fyri øll skip og bátar. Útvaldu feskfiskasløgini eru Toskur, Hýsa, Upsi, Brosma, Longa og Kongafiskur.*

Mynd 8 vísir sindur ógreið úrslit, hóast tað týðiliga sæst miðalprísirnir lækka, jú longri túrurin er. Tó er tað allarhelst ikki rætt at koyra allar skipabólkarnar saman, og samanbera túralongdina. Orsøkin er

at fiskasløg og prísir millum bólkarnar eru ógvuliga ójøvn. T.d. royna partrolarar nógv eftir upsa, meðan línuskipini fiska mest hvítan fisk, sum tosk, hýsu, brosmu og longu. Vit hava tí valt í fylgiskjali 02 at lýsa túralongdina innan hvønn skipabólk, sum eftir okkara meting gevur eina meiri rættvísa mynd, av góðskumuninum millum skipini í hvørjum skipabólki, tá túralongdin verður brúkt sum ein góðskuparametur.

## Samanbering av bátum innan hvønn skipabólk (benchmarking.)

Fyri at hyggja uppá støðuna frá eini aðrari síðu, hava vit eisini valt, at greina hvønn skipabólk sær, seinastu 3 árini, t.e. frá 2014-2016. Ásannandi at tað kann vera ymiskt hvat skipini royna eftir, hava vit valt at hugt uppá tey mest vanligu fiskasløgini, sum eru Toskur, Hýsa, Upsi, Longa og Brosma.

| | 2014 | | 2015 | | 2016 | | Vektað | Kg. íalt | Góðskutap |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skipabólkur** | Miðal (kr/kg) | Kg. íalt | Miðal (kr/kg) | Kg. íalt | Miðal (kr/kg) | Kg. íalt | **Miðal (kr/kg)** | **2014 - 2016** | 2014-2016 |
| Blk.1.2: Garnaskip | 7,56 | 23.538 | 7,87 | 1.950 | 7,30 | 35.764 | 7,49 | 61.252 | **82.337** |
| Blk.2: Partrolarar | 10,10 | 826.979 | 10,07 | 922.057 | 9,05 | 538.530 | 9,78 | 2.287.566 | **2.079.058** |
| Blk.3: Línuskip + 110 Tons | 11,35 | 4.294.239 | 12,50 | 4.609.199 | 11,60 | 3.405.240 | 11,86 | 12.308.678 | **31.519.150** |
| Blk. 4b: Útróðrarbátar 40 - 110 T. | 12,56 | 1.278.940 | 13,40 | 1.497.966 | 12,87 | 916.752 | 12,99 | 3.693.658 | **2.959.023** |
| Blk. 4A: Útróðrarbátar 15-40 T | 12,60 | 348.633 | 13,49 | 411.335 | 13,31 | 262.164 | 13,15 | 1.022.132 | **243.054** |
| Blk. 4T: TROLBÁTAR | 10,56 | 1.000.766 | 12,24 | 1.140.053 | 11,57 | 1.456.479 | 11,46 | 3.597.298 | **1.327.689** |
| Blk. 5A: Útróðrarbátar vinnul. | 12,33 | 1.440.907 | 13,47 | 1.293.013 | 13,60 | 1.004.580 | 13,09 | 3.738.500 | **4.652.991** |
| Blk. 5B, Útróðrarbátar | 11,62 | 614.702 | 12,72 | 803.108 | 12,53 | 841.604 | 12,35 | 2.259.414 | 8.744.581 |
| **Góðskutap íalt yvir 3 ár (2014-2016) - sølur á FMF:** | | | | | | | | | **51.607.884** |

*Talva 2: Vísir munin á miðal prísi hjá hvørjum báti í einum skipabólki, tá ið besti báturin í bólkinum verður samanborðin við restina av bólkinum. Fiskasløgini eru Toskur, Hýsa, Upsi, Longa og Brosma fyri árini 2014 - 2016.*

Hyggja vit eftir góðskutapinum í virði yvir 1 ár, fáa vit 51.607.884k. / 3 = 17.202,628 kr..

Hetta virðistapið er tó einans fyri søluna á FMF. Vit vita, at sølan á FMF bert stendur fyri uml. 1/3 av søluni av feskum fiski undir Føroyum. Um vit ganga út frá, at hinir 2/3 av sølunum líkjast okkara tølum, so er samlaða virðistapið eftir hesum leistinum **kr. 51.607.884 kr**. um árið. Her skulu vit hava í huga, at talan er bert um virðistap í fyrsta stiginum (sí mynd 2), sum er frá veiðuliði til framleiðara. Undir umrøðu av úrslitum vísa vit á, hvat samlaða virðistapið, vegna vánaliga góðsku er mett at vera.

Umframt nevnda virðistapið í kr./kg frá 2014-2016, vísir talva 2 eisini at húkaveiddur fiskur fær besta prísin, meðan fiskur veiddur við netreiðskapið fær vánaligasta prísin, í okkara datagrundarlagi.

Á talvu 3 niðanfyri, sæst miðal prísmunurin í kr./kg millum ymsu bólkarnar.

| | 2014 | | 2015 | | 2016 | | Vektað | Prísmunur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skipabólkur** | Miðal (kr/kg) | Kg. íalt | Miðal (kr/kg) | Kg. íalt | Miðal (kr/kg) | Kg. íalt | **Miðal (kr/kg)** | **kr/kg.** |
| Blk. 4A: Útróðrarbátar 15-40 T | 12,60 | 348.633 | 13,49 | 411.335 | 13,31 | 262.164 | 13,15 | |
| Blk. 5A: Útróðrarbátar vinnul. | 12,33 | 1.440.907 | 13,47 | 1.293.013 | 13,60 | 1.004.580 | 13,09 | 0,05 |
| Blk. 4b: Útróðrarbátar 40 - 110 T. | 12,56 | 1.278.940 | 13,40 | 1.497.966 | 12,87 | 916.752 | 12,99 | 0,16 |
| Blk. 5B, Útróðrarbátar | 11,62 | 614.702 | 12,72 | 803.108 | 12,53 | 841.604 | 12,35 | 0,80 |
| Blk.3: Línuskip + 110 Tons | 11,35 | 4.294.239 | 12,50 | 4.609.199 | 11,60 | 3.405.240 | 11,86 | 1,29 |
| Blk. 4T: TROLBÁTAR | 10,56 | 1.000.766 | 12,24 | 1.140.053 | 11,57 | 1.456.479 | 11,46 | 1,69 |
| Blk.2: Partrolarar | 10,10 | 826.979 | 10,07 | 922.057 | 9,05 | 538.530 | 9,78 | 3,36 |
| Blk.1.2: Garnaskip | 7,56 | 23.538 | 7,87 | 1.950 | 7,30 | 35.764 | 7,49 | 5,65 |

*Talva 3: Vísir munin millum bestu miðal prísir í hvørjum skipabólki árini 2014 - 2016. Fiskasløgini, sum eru samanborin eru Toskur, Hýsa, Upsi, Longa og Brosma*

Miðal prísmunurin (talva 3) er ikki so áhugaverdur tá ið talan er um at samanbera ymsu skipabólkarnar, tí fiskasløgini sum ymsu bólkarnir royna eftir eru ymisk, so tí eru samanberingar millum bólkar ikki so áhugaverdar í hesum samanhangi. Men innan hvønn skipabólk eru tó eisini týðiligir munir. Góðskutapið í talvu 2 er roknað út frá bestu bátunum í hvørjum bólki.

Fyri at runda av hendan partin, hava vit hugt uppá samlaðu prísgongdina fyri tosk, hýsu, upsa og brosmu, og fyri allar landingar í Føroyum í 2014-2016. Her sæst at gongdin hevur verið, at prísirnir hava verið nakakð hækkandi fyri upsa og tosk, meðan brosma og hýsa hava fingið lægri prísir í 2016.




*Mynd 9: Vísir avreiðingar prísir fyri allar landingar av Toski, Hýsu, Upsa og Brosmu fyri árini 2014-2015 (kelda: Hagstova Føroya)*

## Kanningar og vitan frá feløgum og persónum á føroyska marknaðinum

Annað týðandi íkast í hesi greining er lýsing frá ymisku framleiðarunum. Vit hava samstarvað við ymsar persónar og feløg í vinnuni, sum dagliga meta um góðsku á fiskinum. Hóast stór semja er um, at góðskan á føroyskum feskfiski yvirskipað kann gerast væl betur, enn hon er í dag, so hava seinastu árini verið gjørd fleiri átøk, fyri at betra um góðskuna. Nógvir partar á føroyska marknaðinum eru tí tilvitaðir um týdningin á góðari góðsku.

Greining av *orsøkunum* til hesar lutfalsligu stóru munir er ikki beinleiðis partur av hesi støðulýsing. Ætlanin er, at úrslitini frá hesi støðulýsing skulu nýtast til víðari arbeiði, har kanna verður nærri orsøkir og átøk, sum kunnu stimbra undir eina høga góðsku fyri allan feskfiskaflotan. Tó verður ofta víst á, at umstøðurnar umborð á skipunum, og leiðslan av skipunum (t.e. reiðari og skipari) hava stóran týdning fyri møguleikan til at skapa góða góðsku umborð.

Fyri at skipa vitanina frá teimum persónum og feløgum, sum vit hava tosað við ella vitjað, valdu vit at stilla øllum somu grundspurningar, so ein heild fekst burtur úr hesum. Niðanfyri síggjast spurningar og svar frá teimum, sum vit tosaðu við.

## Úrslit frá samrøðum við persónar og feløg á føroyska feskfiskamarknaðinum.

Samrøður hava verið við 8 aktørar á føroyska feskfiskamarknaðinum, sum dagliga meta um góðskuna á fiski, sum teir keypa. Fyri at kunna samanbera teirra íkast, valdu vit at standardisera spurningarnar, so allir fingu somu spurningar stillaðir.

1. Hvør er høvuðsframleiðslan hjá felagnum?
    a. Saltur fiskur.
    b. Feskur og frystur fiskur
    c. Frystur og saltur fiskur.
    d. Serligar tilvirkaðar vørur

2. Hvørjir skipabólkar keypa tit fiskin frá?
    a. Keypa nógvan frystan fisk frá Norra
    b. Uppboðssølan 2.000 tons
    c. Keypa fryst frá teimum fáu føroysku frystilínuskipunum, sum bjóða fiskin út.
    d. Helst línufisk
        i. Trolfisk um summar, vegna tað at hann hevur betri fysiologiskar eginleikar tá, m.a. er feitari enn línufiskur um summari.
        ii. Pilka teir góðu bátarnar burturúr.
    e. Keypa í høvuðsheitum frá línuskipum og frystilínuskipum
    f. Nakað av trolfiski verður eisini keypt

3. Hvørji viðurskifti (faktorar) meta tit hava størstan týdning fyri góðskuna á fiskinum?
    <u>Virki 1</u>:
    a. Dagatalið yvir hvussu gamal fiskurin er, hevur størsta týdning. Fiskur 1 – 4 dg. fer allastaðni. Fáa altíð 1 evrur meira fyri kvalitet 1 enn Íslendingar og Norðmenn. Trupulleikin er, at teir fáa ikki fatur á kvaliteti 1 vegna tað, at virkir og skip eru blivin støðugt meira samantvinna nú enn áður, gjøgnum felags eigarar.

    <u>Virki 2</u>:
    a. Skal fiskur seljast til Spanien, krevst góð góðska, helst góðska 4
    b. Blóðgingin hevur stóran týdning
    c. Ísing: Dømi 10 tons av ísi til 22 tons av fiski.
    d. Dømi: Sum tað sæst á tølum frá FMF 7/12/2016 fekk *ávísur bátur* væl betri prís fyri stikkaða hýsu. Blátt fekk 1,10 kr./kg meira enn gult. Munurin millum dg. 1 og dg. 5 var 2,10. Her sæst týðiliga at keyparar raðfesta góðsku høgt.

    <u>Virki 3</u>:
    a. Aldur á fiskinum
    b. Blóðging
    c. Ísing

4. Á einum skal frá 1 – 5, har 5 er best. Hvussu síggja tit so (sum heild/í miðal) uppá góðskuna á ferskum fiski, frá føroyskum skipum?
    a. Støðan sum heild: → 3 í miðal
    b. Telefonfiskur daggamal: → 4 – 5: Ofta besta góðskan
    c. Gólvsøla: → 1 – 4: Sera ójøvn góðska.
    d. Trolbátar: → 4 í miðal
    e. Minni línubátar: → 4 – 5: Oftast góð góðska → stuttir túrar.
    f. Línuskipini: → 2 – 5 Stór variasjón
    g. Garnafiskur: Ávísir bátar → 3 – 5: Gott, í mun til at tað er garnafiskur

Møgulig grundgeving fyri valinum omanfyri:

- Føroyska góðskan hevur betri orð á sær enn tann norska, men verri enn tann Íslendska, sum liggur á 4
- Góðskan er sum heild væl frægari í dag enn fyri 10 árum síðan. Flestu skipini eru tilvitað um góðsku. Verður farið 10 ár aftur í tíðina skal góðskan lækkast 1 – 2 stig

5. Hvørja góðskuskiljing/-flokking nýtir tykkara virki av rávøruni?
   a. Góðska 1: 1 – 4 dg. gamal fiskur
   b. Flestu línubátarnir eru góðir, men teir flestu eru ov leingi út, t.d. 10. Dg.
   c. Nýta góðsku 1, 2, 3 og vra[1]k yvir fyri kundanum.
   d. Góðskuskala 1 – 10 : Brúka litir, lukt v.m.
   e. Datomerking í litum.
   f. Besta góðskan: Hevur rætta litin og er fastan tekstur
   g. Miðal góðska: Rættan lit, men nakað leysari tekstur
   h. Vrak, men sum tó kann nýtast til matna (ofta blóð í fiskinum)
   i. Fyri frystan fisk: T & TT saman sum besta góðska
   j. TTT og Vrak, men sum tó kann nýtast til matna

6. Í hvønn mun ávirkar góðskan á rávøruni prísin, sum tit fáa úti á marknaðinum ? Ber til at vísa á møgulig dømir uppá prísmunir á endavøruni úti á marknaðinum í mun til góðsku.

   Virki 1: Fáa altíð 1 Eur meira fyri góðsku 1 enn Íslendingar og Norðmenn. Trupulleikin er, at tað ber ikki til at fáa fatur á nóg nógvari vøru av góðsku 1, m.a. tí at fiskurin ikki verður bjóðaður út í nóg stóran mun.

   Virki 2: Selja nógv til *blanktorsk*[2] marknaðin við teimum røttu bátunum.

   Virki 3:
   a. Missa nógv uppá føroyska 'brandið', av tí at tað er so trupult at fáa fatur á feskari føroyskari rávøru.
   b. Hava sum heild eina virðisøking uppá 10 kr./kg. rávøru, í mun til feskfiskaframleiðslu, har nærmast ongin virðisøking er.
   c. Tá nokk var til av fiski undir FO, var lætt at fáa fatur á rávøruni, og fekk virki tá sum heild 1 EUR meira pr. kg. fiska úti á marknaðinum, tí tað tá var léttari at fáa fatur á góðu góðskuni.

7. Eru marknaðir, sum tað er trupult at koma inn á vegna væntandi góðsku á vøruni?

[1] Vrak er í hesum sambandi, vánaligasta góðskan, sum framvegis er egnað til matnað. Tað er serliga saltfiskamarknaðuri, ið nýtir hesa flokking.

[2] *Blanktoskamarknaðurin* er marknaður fyri bestu góðsku av heilum fiski við ella uttan høvd. Fiskurin er vanliga serpakkaður, og verður vanliga seldur heilur í skornum eindum í matvøruhandlum. Frankaríki, Danmark og Spania eru størstu marknaðirnir. Í stóran mun er Danmark ein 'transittmarknaður'. Blankfiskamarknaðurin í Evropa er mettur at vera avmarkaður til 15 - 20.000 tons um árið (Vestlandsprogrammet 2010), harav ein partur eisini til tíðir er aldur toskur.

a. Nei. Tí vit selja har mest kann fáast fyri vøruna. Vit hava jú nøkur tons, sum eru góð. Og tey eru sølubar til góðsku 1. Men ein trupulleiki er at tað eru so fá kg, at meðalprísurin vit selja lastirnar fyri klárar ikki minstaprísin sum er settur á rávøruna á uppboðssøluni í fo.

   Um vit siga at 80/90% av vøruni var góðska 1. So var als eingin trupulleiki at minstiprísurin var á høgum støði. Men sum nú er, er minstiprísur settur eftir hvat góðska eitt kann bera. Og tað sum kemur út aftur er bert uml 30% nr.1 (topp prísur), 40 % nr 2(-20% av 1. prísinum) 20% nr 3( -35-40% av 1 prísinum) og 5-10 mix/vrak.(-50% av 1 prísinum). Men tað verður torført at gera seg upp á nýggjum marknaðum, vit góðskuni, sum vit hava nú. Tað er eyðsæð!

b. *Blanktorsk* marknaðin kundu føroyskir bátar komi betur inn á. Her eru vit í ov lítlan mun við.

8. Onnur viðurskifti, sum vóru nevnd – lýst tilvildarliga niðanfyri:
   a. Støðan sum heild: Tann, sum hevur fiskin, hevur buktina um báðar endar. Eitt fiskavirkið livir bara av fiski, og kann tí sjáldan siga nei til at keypa. Grunda á lágu nøgdina, ið verður boðin út til fríða sølu liggur minsti prísurin fyri toskin 4-5 kr. yvir t.d. Norra og Ísland. *Vit fylgja dagliga við hesum marknaðum, og kenna tí væl rávøru prísin í Íslandi og Noreg*.
   b. Summir keyparar av fiski dumpa prísin
   c. Vit hava lutfalsliga stóran part av marknaðinum, sum vit leggja okkum eftir.
   d. Nøkur virkir fáa eina rúgvu av fiskasløgum inn gjøgnum hurðina, men ongin er heimsmeistari í øllum, og av tí sama er góðskan ógvuliga ójøvn á endavøruni.
   e. Frysta rávøran í dag: Finnast eini 30.000 tons av fiski, sum vit er kappingarfør at bjóða uppá – men fáa ikki møguleika til at fáa fatur á fiskinum.
   f. Frystur fiskur: Av og á er ikki talan um veruliga uppboðssølu. Seljarin leggur 5 kr. omaná prísin á uppboðssøluni, men endar við at keypa alt sjálvir fyri undirprís.
   g. Í Suðri sær tað út til at logistikkurin eisini ávirkar prísin, sum bátarnir fáa. Har er fáir keyparar av fiski og fleiri úbjóðarar – á tølunum hjá FMF sæst at virkini har ofta fáa fiskin væl bíligari enn aðrir, vegna hesar serligu umstøður.
   h. Okkara meting er at milliónir eru á muni millum ávísar skipabólkar vegna góðsku.
   i. Ikki óhugsandi at trolbátar og bólkur 3 hvørva, um onki verður gjørt við góðsku o.l.
   j. Saltfiskavirkini keypa 5-7 dg. gamlan fisk, tí teir hava ikki ráð at keypa nýggjari fisk.
   k. Sum heild: Temperaturur í lagi. Bløðgingin ikki í lagi og ov nógv í kassunum í mun til ís.
   l. Vit gera ikki mun á góðskuni, men sigur frá til bátarnar. Royna soleiðis at fáa hægri góðsku frá øllum bátum.
      i. Ávísir bátar (t.d. línuskip), sum áður hava havt vánaligan fisk, hava nú góðan fisk. Hetta er eitt gott dømi um at leiðslan fyri skipinum (skipari og reiðari) hava stóran týdning fyri hugburðin til góðsku umborð.
         1. Aðrir (nevndir) bátar, sum hava verið góðir, eru nú vánaligir. Hetta er enn eitt prógv um tað sama.
   m. Vit hava sagt, at vit hægst skulu hava 7 dagar gamlan fisk – so tað leggja vit okkum eftir.
   n. Nógvur sandmaðkur eisini ein góðskutrupulleiki á ávísum fiskileiðum.
   o. Høvdu vit fingið somu reglur sum í Íslandi, har tað bleiv sett mark fyri hvussu leingi ein feskfiksabátur kundi verið úti, hevði tað lyft alla vinnuna til eina enn betri góðsku.

## Gongdin í tølum – í Føroyum og aðrastaðni.

Úrslit frá Noreg (Joensen et. al 2014) vísa at línufiskur sum heild hevur betri góðsku enn fiskur, fiskaður við troli, nótum ella gørnum. Har vístu 71.% góða góðsku, 8% miðal góðsku, meðan 20% var vánalig góðska. Okkara úrslit stuðla hesum. Tá ið talan er um somu fiskasløg fær húkaveiddur fiskur besta prísin. Slíkar samanberingar, skulu tó takast við fyrivarni, tí partrolarar hava aðra høvuðsveiðu enn eitt nú línu- og útróðrarbátar.

Vit hava eisini hugt nærri eftir góðskuni á saltaðum fiski. Jákup Poulsen hevur áður víst á, at gongdin í 2009 var at Íslendski fiskurin fekk betur prís enn føroyski saltfiskurin á Spanska marknaðinum. Niðurstøðan var, at tað serliga vóru stórir góðskumunir, sum gjørdu munin. Vit hava tí roynt at kannað, um gongin er tann sama enn. Vit hava tó ikki funnið nýggjari tøl enn frá 2013. Niðanfyri vísa vit tí á gongdin fram til 2009 og gongdina í 2013.




**Figure 3.** **Price (Trade value/Net weight) of wet salted cod products from Norway, Iceland and Faroe Islands. The data represents data reported under HS030562: Cod salted or in brine not dried or smoked (Statistics Iceland 2010; UN ComTrade 2010).**

Niðanfyri sæst tó, at føroyskur bacalao saltfiskur í 2013, samlað sæð fekk betri prís enn íslendski. (José Fernández Polanco & Trond Bjørndal 2015). Føroyski fiskurin fær her besta prísin á spanska bacalao marknaðinum, sum kann benda á, at góðskan er ment aftur í mun til íslendskan og annan saltfisk.

| Land | Nøgd (tons) | €/Kg |
|---|---|---|
| Germany | 1.689,70 | 4,26 |
| Denmark | 1.305,80 | 3,40 |
| Iceland | 5.491,60 | 4,03 |
| Faeroe | 3.510,70 | 4,39 |
| Norway | 1.308,60 | 3,42 |
| Netherlands | 808,9 | 3,59 |
| Portugal | 805,3 | 3,32 |
| UK | 784,2 | 1,82 |
| Russia | 546,5 | 4,53 |
| Sweden | 1.346,80 | 3,13 |

*Talva 4: Vísir miðal søluprísir á Spanska marknaðinum fyri Bacalao saltfisk. Í 2013 fekk føroyski fiskurin besta prísin.*

Gongdin seinastu árini við botnfiskinum undir Føroyum hevur verið at botnfiskastovnarnir undir Føroyum, hava havt tað trupul. Hetta sæst í myndini niðanfyri.




*Mynd 10: Vísir veiðuna eftir ymisku fiskasløgunum á føroyskum øki*

Mynd 11 niðanfyri vísir gongdina millum nøgd og prísir. Verður hugt nærri eftir myndini sæst, at virði á toska útflutninginum er voksin nakað seinastu 2-3 árini. Í 2015 varð virði á toskinum lutfalsliga hægri enn tonsatali. Frystur toskur frá Flemish Cap og innfluttur frystur toskur, eisini telur uppeftir. Toskafiskiskapurin undir Føroyum er ikki batnaður í 2016. Myndin niðanfyri vísir eisini at virði á Longu er hækkandi.




*Mynd 11: Fiskaútflutningur (tons og prísur) býttur á fiskasløg 2000-2015. Stabbarnir vísa veidd tons, meðan linjurnar vísa gongdina í virðinum.(dátukelda: Hagstova Føroya)*

## Úrslit á saltfiskamarknaðinum

Skiftandi góðska á lidnu vørunum, sum fara út á marknaðin kunnu hava fleiri avleiðingar í marknaðinum. Í samrøðum við persónar og feløgini í verkætlanini eru m.a. hesi viðurskifti nevnd:

- Ov lítið av góðsku 1: Feløgini framleiða ov lítið av teimum vørum, ið mest fæst fyri. Hetta førir til ein lágan meðalprís fyri endavørurnar á marknaðinum.
- Klagur. Skiftandi góðska førir til økt tal á klagum frá marknaðinum. Hetta førir eisini til stórar eykaútreiðslur fyri framleiðararnar. Beinleiðis tap er ein avleiðing, men eisini umdømi hjá framleiðaranum og føroyska marknaðinum sum heild, gerst ein trupulleiki.
- Kundarnir velja framleiðarar við bestu góðsku framum. Her bleiv víst á, at innanfyri saltfisk stendur íslendskur fiskur sterkt í løtuni, grunda á, at feløgini har, gjøgnum fleiri ár hava lagt dent á eina høga og javna góðsku. Okkara talva 2, vísir tó at føroyski saltfiskurin í 2013 hevði endurvunnið fyrstaplássið á Bacalao marknaðinum.
- Í veruleikanum ynskir keyparin á spanska marknaðinum føroyska fiskin, tí hann av náttúruligum orsøkum er hvítari í kjøtinum enn t.d. tann Íslendski. Men lutfalsligi lági parturin av góðsku 1, saman við einum miðvísum marknaðarføringsarbeiði ger, at Íslendingar gjøgnum nógv ár fingu betri prís enn Føroyingar.

## Niðurstøður frá samrøðum við fiskaframleiðarar og seljarar

Fiskaseljarar, sum vit hava tosað við, nevna serliga fylgjandi viðurskifti, sum avgerandi fyri at at menna góðskustøði á feskum fiski víðari:

a) Grundleggjandi viðurskiftini, sum kunngerðin setur skulu vera í lagi.
b) Túralongdin hevur stóran týdning.
c) Missa nógv uppá føroyska 'brandið', av tí at tað er so trupult at fáa fatur á feskari føroyskari rávøru.
d) Prísurin á føroyska fiskinum ov høgur á marknaðinum, í mun til góðskuna. Tí er neyðugt hjá framleiðarum at fokusera nógv uppá eina effektiva framleiðslu, fyri at tryggja kappingarføri.
e) Stórur munur millum skip og skipabólkar vegna ymiskan hugburð til góðsku hjá skipaleiðsluni.
f) Ynskiligt at vinnan sjálv fann útav, at seta mark fyri hvussu langur ein túrur kann vera fyri at tryggja góða góðsku.

### Pelagiska vinnan

Sjálvt um tað liggur eitt sindur við síðuna av endamálinum við hesi kanningini, hava vit valt at taka ein part við um pelagisku vinnuna.

Pelagiska vinnan er rættiliga nýggj í Føroyum, soleiðis sum vit kenna hana í dag. Frá at vera ein vinna, har so at siga alt fór til mjølframleiðslu, fer í dag, ein støðugt størri partur til matna. Ein orsøk til hesa jaligu gongd, er allarhelst at vit seinastu 5 árini hava fingið 3 nýmótans virkir, ið framleiða pelagiskan fisk til matna. Hóast virkini hava fá ár á baki, hava tey lagt seg eftir at framleiða ta góðsku, sum kundarnir eftirspyrja. Tí seta hesi virkir eisini krøv til rávøruna, sum tey keypa inn. Ymiskt er tó, hvussu tey arbeiða, tí eigararnir eru ikki teir somu á nøkrum virki, men talan er um skipanir, har skipini heilt greitt vita hvør góðska skal til fyri at koma inn undir ein ávísan prísklassa. Hendan menning er farin fram í einum tøttum samstarvi millum virkir og skip.

Ein avleiðing av at krøv verða sett til skipini um góðsku á pelagiska fiskinum er, at nøkur skip ikki landa til hesi virkir longur, og tí kanska heldur selja fiskin til ídnað(t.e. mjølframleiðslu). So hóast vit ikki hava neyv tøl uppá hvønn avleiðing hetta hevur fyri tey skip, ið ikki fáa rætta prísin fyri sína last, so er skjótt at staðfesta, at hesi skipini hava eitt stórt inntøkutap vegna væntandi góðsku.

## Umrøða av úrslitum

Kanningar í Noregi (Svorken, Hermanse og Karlsen, 2013) hava víst, at í framleiðsluliðinum hjá einum vanligum norskum framleiðara eru eitt virðistap vegna vánaliga góðsku á 2,7 kr/kg, svarandi til 13%.

### Góðskutap í virði í mun til dagalongd.

Tey flestu vilja í Føroyum, vilja helst viðurkenna, at ein lækking av góðskuni, eisini viðførir tap av inntøkum her á landi. Eitt neyvt yvirlit yvir hvørji virðir, sum ein missir í framleiðslu, á marknaðinum og hvørjar avleiddar útreiðslur eru fyri mista góðsku á feskum fiski, er ikki møgulig at gera uttan eina langt meira umfatandi greining av støðuni. Tá mugu bæði mistar inntøkur og øktar útreiðslur í hvørjum liði fram til endabrúkaran, umframt tap av umdømi, greinast nærri.

Norskar og íslendskar kanningar hava tó mett at øktar útreiðslur í samband við vánaliga góðsku, svara til góðar 2,5 kr./kg í framleiðsluliðinum. Høvuðsorsøkin til hesar øktu útreiðslur eru lægri úrtøka og hægri lønarútreiðslur til framleiðsluna av endavøruni. Hetta er eisini í tráð við tað, sum persónarnir í okkara tilvísingarbólki hava nevnt.

Mótsatt er tað eisini greitt, at tað kunnu verða ávísar sparingar at heinta við longri túrum, so sum oljunýtsla o.a. variablar útreiðslur. Tann optimala túralongdin vil í so máta variera bæði í mun til skipabólk, veiðu (hvussu fiskiskapurin er) og møgulig onnur viðurskifti.

Vit hava tó loyvt okkum at meta um beinleiðis virðistap vegna ov vánaliga góðsku í avreiðingarliðinum. Hetta hava vit gjørt, við at seta upp talvuna niðanfyri:

| Gjøgnumgongd av sølum á FMF 2011 - 2016 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| **Túralongd** | **Tons seld** | **Kr./Kg.** | | **Sølur** | **Prísmunur** | **Virðstap** |
| **1 - 7 dg.** | 23.569.276 | 12,39 | á | 93.262 | - | - |
| **8 - 12 dg.** | 26.277.591 | 10,81 | á | 18.426 | 1,57 | 41.340.702 |
| **13 - 16 dg.** | 11.273.692 | 10,68 | á | 7.407 | 1,70 | 19.192.564 |
| **> 17 dg.** | 268.758 | 9,66 | á | 119 | 2,72 | 731.361 |
| | | | | | | |
| **Møguligt viðistap** (í fyrstu hond): | | | | | | **61.264.626** |

*Talva 5: Vísir sølur á FMF frá 2011 - 2016 fyri Tosk, Hýsu, Upsa, Blálongu, Longu, Brosmu og Kongafisk.*

Sum talvan vísir, so verða flestu tonsini fiska millum dag 8 og 12 í okkara kanningum, og her síggja vit tí eitt virðistap uppá 41.340.702 kr. Samlaða virðistapi í mun til prísin, sum fæst frá degi 1 – 7 er 61.264.626. kr. býtt yvir árini 2011-2016, t.e. 6 ár.

Nú skal eisini havast í huga at FMF einans stendur fyri uml. 30% av øllum sølum av feskfiski undir Føroyum. Av tí at veiðumynstrið sær út til at vera tað sama hjá teimum skipum, sum ikki selja umvegis FMF, er tað ikki órímiligt at meta virðistapið at vera áleið 180 mió kr. fyri hesi seinastu 6 árini, altso áleið 30. Mió. kr. um árið í fyrstahondsvirði.

## Góðskutap í virði í mun til bestu prísir í ymisku skipabólkunum

Okkara seinna metingin av virðistapi vegna væntandi góðsku vísti fylgjandi úrslit:

Virðistapið eftir hesum leistinum er **uml. 55 mió.kr**. um árið, tá hugt verður eftir góðsku og samanbering við bestu bátarnar innan hvønn skipabólk. Her skal havast í huga, at talan er bert um virðistap í fyrsta stiginum, sum er frá veiðuliði til framleiðara.

Nýta vit áður gjørdar kanningar sum grundarlag fyri meting av virðistapið vegna vánaliga góðsku í framleiðsluliðinum, so kunnu vit rokna við uml. DKK 2,25 kr./kg her. Í árunum 2014-2016 vóru veidd 138.093 tons, t.e. 138.093.000 kg. hesi 3 árini, av okkara útvaldu fiskasløgum. Fiskur fer eisini ótilvirkaður av landinum. Fyri árini 2014-2016 fóru 23.097.000 kg, ótilvirkað av landinum (kelda: Hagstova Føroya). Um vit falda 2,25 við (138.093.000-23.097.000) fáa vit 258.741 mió. kr. í framleiðslutapi yvir 3 ár, svarandi til áleið kr. 86 mió. kr. í virðistapi í framleiðsluni hesi árini.



Við at nýta skipabólkarnar sum grundarlag, og somuleiðis taka hædd fyri granskingarúrslitum, sum vísa á framleiðslutap, fáa vit soleiðis eitt árligt virðistap vegna væntandi góðsku á kr. 86 + 55 = **141 mió. kr.**

Tað hevur áður verið víst á, at eitt framleiðslutap vegna vánaliga góðsku í saltfiskaframleiðslu á uml. 2,0 kr./kg. er ein meting, sum saltfiskaframleiðarar nýta at stýra eftir (Jákup Poulsen 2011). Norsku kanningarúrslitini á 2,25 DDK kr./kg, eru nakað hægri, men sannleikin liggur allarhelst onkustaðni har ímillum.

### Góðskutap sambært samrøðum við aktørar í vinnuni

Føroysku fiskakeypararnir, sum vit hava tosað við, meta at bert uml. 50 % av fiskinum á uppboðssøluni, hevur nøktandi góðsku til teir bestu marknaðirnar. Vit hava tó valt ikki at rokna beinleiðis uppá hetta góðskutapið, tí tað er treyta av nógvum faktorum, m.a. fylgjandi:

a) Tað er meira krevjandi at selja til teir best gjaldandi marknaðirnar, sum eisini eru avmarkaðir í støðd.
b) Við avmarkaðum tilfeingið, kann veitingartrygd vera ein forðing fyri langtíðar sambondum við teir bestu marknaðirnar.
c) Kappingin á teimum bestu marknaðunum er hørð – nógvir eru um boðið.
d) Høg góðska gevur bara betri prís, tá ið ein marknaður er nóg stórur til at keypa alla framleiðsluna av hágóðskuvørum.

Nevndu atlit krevja drúgvari kanningar, og kunnu verða partur av einum framhaldandi arbeiði eftir hesa støðulýsing.

## Samandráttur

Gjøgnum árini hevur nógv kjak verið um góðsku á feskum fiski, og hvat má gerast fyri at betra um góðskuna, og fáa meira burturúr. Seinastu 15 árini sær tað út til at góðskan hevur verið í eini ávísari menning, ( sí talva 1). Fiskiskapurin eftir vanligu botnfiskasløgunum, toskur, hýsa og upsi, hevur verið minkandi seinastu 10 árini. Toskafiskiskapurin hevur tó verið í eini menning seinastu 3 – 4 árini. Tað er ikki so ósannlíkt, at lítla tilfeingi seinastu 10 árini hevur fingið bæði veiðu- og framleiðsluliði at hugsa meira um góðsku. Eitt avmarkað tilfeingið kann einans virðismennast gjøgnum høga góðsku til teir bestu altjóða marknaðirnar.

Hvat góðsku á feskfiskinum viðvíkur, kunnu úrslitini í hesi støðulýsing sigast at vera fylgjandi:

- Vánalig blóðging og vánalig ísing verða mett at vera ein høvuðsorsøk til at góðskan sum heild liggur á einum meðalstøði fyri føroyskan feskfisk.
- Túralongdin hjá føroyskum línuskipum er ein trupulleiki. Tá línuskip eru úti í 10 – 12 dagar er tað bert 6 – 7 teir síðstu dagarnir, har góðskan er í lagi, og tí fáa góðan prís á marknaðinum. Virðistapið av túralongd er mett at vera uml. 36 mió. kr. árliga í fyrstahondsvirði. Harumframt kemur framleiðlsutap á uml. 86,3 mió. kr. árliga.

- Kanningar av virðistapið í mun til besta bát í hvørjum bólki eru 138 mió. kr. árliga. Tað kann tosast bæði fyri og ímóti at nýta besta bát, sum grundarlag fyri tap í góðskuvirði hjá øðrum bátum. Men við at samanbera okkara úrslit við túralongdina sæst, at ber góðar 16 mió.kr. í árligum góðskutapi skilja hesar báðar greiningarhættirnar.
- Vánalig rávøra kann ongantíð gerast betur, og er tí fyrsta fyritreyt fyri eini góðari endavøru til kundan.
- Góð rávøra gevur eisini størri fleksibilitet í mun til hvønn marknað ein framleiðari / fiskaseljari kann selja til. Hetta viðførir ein prís, sum er væl hægri enn fyri meðalgóðsku.
- Góð rávøra krevur minni arbeiðsorku, og gevur tí eisini eitt hægri skiftisavlop í framleiðsluni fyri framleiðaran.  Vánalig rávøra viðførir størri avskur, og meira manuella handfaran. Aðrar kanningar (føroyskar og altjóða) vísa at hesi viðurskiftini kunnu hava eitt virðistap á millum 2 og 3 kr./kg.
- Nøkur skip skara framúr við góðari góðsku. Orsøkirnar kunnum m.a. vera:
    - Leiðslan av skipinum (reiðari og skipari) leggja seg eftir at hava eina góða góðsku til lands.
    - Góðskusamstarv, har fiskakeypari saman við skipinum gerast samdir um hvør góðskan skal vera, um talan skal vera um t.d. at selja tosk til *blanktoskamarknaðin*.

- Eitt neyvt yvirlit yvir hvørji virðir sum ein missir í marknaðinum og hvørjar avleiddar útreiðslur eru fyri mista góðsku á feskum fiski, er ikki møgulig at gera uttan eina langt meira umfatandi greining av støðuni. Tá mugu bæði mistar inntøkur og mistar útreiðslur í hvørjum liði fram til endabrúkaran, umframt tap av umdømi, greinast. Ein slík greining er ikki partur av verkætlanini í hesum umfari. Vit halda okkum tó kunna staðfesta fylgjandi:
    - Í altjóða marknaðinum fyri feskan fisk, er tað gjørligt at heinta munandi hægri prís í forbrúkaramarknaðinum (t.d. blanktosk) enn á ídnaðarmarknaðinum. Havast skal tó í huga at hesin marknaður er nakað avmarkaður, og tí mettist skjótari enn ídnaðarmarknaðurin.
    - Rávørugóðskan hevur stóran týdning fyri útbýtið frá teimum vørunum við tí besta prísinum í flakavinnuni. Kanningar av hesum vísa at munurin millum miðal prís á vørumiksi frá góðari rávøru í mun til vánaliga rávøru kann liggja um 20%. Harumframt eru framleiðslukostnaðirnir væl hægri fyri vánaliga rávøru, og kann hetta tí eisini gerast munurin millum yvirskot ella undirskot hjá einum virki.
- Einstakir útflytarar fáa betri prís fyri hægri góðsku, men hetta krevur góðan og langtíðar hugsandi marknaðarkunnleika. Í Føroyum eru 2 – 3 fyritøkur, sum eru á slíkum feskfiskamarknaðum.  Tá ein fyrst er komin inn á ein slíkan marknað, er tað ein støðug avbjóðing at fáa nóg nógva rávøru við røttu góðskuni, sum ger feløgini før fyri at halda avtalaðar veitingar yvir tíð.

## Nakrar samanfattandi niðurstøður um støðuna í dag

| Økir har fiskivinnan stendur sterk | Økir við týðandi betringsmøguleikum |
|---|---|
| Føroysk virkir fáa besta prísin á saltfiskamarknaðinum í Spania. | Økt samstarv millum seljarar (skip og bátar) og fiskakeyparar, um hvør góðskan skal vera fyri at fáa ávísan prís. |
| Prísurin, sum skipini (seljarin) fáa, hevur í 2016 verið á sama støðið ella hægri enn á øðrum norðurlendskum marknaðum. | Tað eigur at vera eitt yvirskipa mál fyri føroyska feskfiskaveiður, at ongin túrur varar longur enn 6 dagar, frá tí at fyrsti fiskurin kemur á dekki og til avreiðing fer fram. Virðistapið er mett at vera í minsta lagi millum 122 og 138 mió. kr. árliga í fyrsta- og annaðhondsvirði, men enn hægri, um tryggar veitingar, sum skapa álit á vørumerki, verða tikin við.  Hetta er fyri árini 2011 – 2016, har miðal fiskiaríðið fyri tosk, hýsu, upsa, longu og brosmu var 83.230 tons á øllum leiðum. Hetta er uml. helvtin av veiðuni, tá hon var hægst. |
| Úrslitini frá kanningum hjá HFS vísa, at góðskan seinastu 10 árini antin er blivin betur ella stendur í stað (talva 1). Tilvitanin um góðsku er stór millum fleiri partar í vinnuni. | Avmarkaða nøgdin av fiski á marknaðinum ger, at vánalig góðska fær ov høgan prís, í mun til bestu góðsku. Munurin er 2-4 kr. millum bestu og vánaligastu góðsku. Helst átti hann at verið hægri. |
| Pelagiska vinnan hevur fokus á góðsku, gjøgnum ymsar ískoytisskipanir, ið tryggja skipum betri prís, við røttu góðskuvirðunum á vøruni | Ov nógvur fiskur í kassunum er ein avbjóðing. Eisini kemur tað ov ofta fyri, at fiskurin ikki verður lagdur niðureftir í kassunum. Hetta ávirkar eisini góðskuna neiligt. |

Tað hevur ofta verið sagt, at tað er ábyrgdin hjá tí einstaka fiskifarinum og keyparunum at tryggja góða góðsku. Teir persónar í vinnuni, sum vit hava tosað við nevna, at eitt tað besta amboðið til at tryggja góða góðsku er, at fiskimaður og keyparar tosað saman um hvørja góðsku keyparin vil hava, og hvat til ber at bjóða fyri slíka góðsku. Hetta er eisini í tráð við kanningar í Noregi, sum vísa tað sama.

Hendan kanningin hevur víst at hóast batar eru hendir seinnu árini innan góðsku á feskum fiski, so eru framvegis nógv virðir at heinta gjøgnum eitt enn hægri fokus á góðsku.

# Tilvísingar

2002: Samandráttur av ráfiskakanningunum 2002. Dánial Gaardlykke,
HFS Málnr.: 449-200200578-1

2014: Samandráttur av ráfiskakanningunum 2012-2014. Arni Petersen, HFS 2014

2013: Variabel kvalitet i verdikjeden. Hvordan påvirker kvalitet lønnsomhet?
Morten Heide og Edgar Henriksen. Nofima rapport 3/2013

2015: Råstoffkvalitet og salgsverdi. Estimert tap for torsk i 2013.
Marianne Svorken, Øystein Hermansen og Kine Mari Karlsen, Nofima rapport 4/2015

2015: Value Chain and Price Integration in the Spanish Market for Salted Cod.
José Fernández Polanco &Trond Bjørndal. Samfunns- og næringslivsforskning AS 10/2015

2016: Samrøður við 8 ymiskir føroyskar virkisleiðarar / stjórar á føroyskum reiðaríum og framleiðsluvirkjum.

2016: Samrøða við Dánial Gaardlykke um framdar ráfiskakanningar og góðskuviðurskifti sum heild á føroyskum feskfiskaskipum.

2016: Tilvísingarbólkur, sum hevur fylgt verkætlanini og somuleiðis eftirmett hana leypandi:

Jákup Poulsen, PRG

Per Mikkelsen, Bátafiskur

Hans Marius í Byrgi, Sjógætir

Arni Petersen, Heilsufrøðiliga Starvsstovan

Høgni Hansen, FMF

# Fylgiskjøl

## Fylgiskjal 1: Tølini, ið liggja til grund fyri útrokningunum í talvu 2.

| | | 2014 Kr/kg & Kg. íalt | | 2015 Kr/kg & Kg. íalt | | 2016 Kr/kg & Kg. íalt | | Vektað Miðal (kr/kg) | Kg. íalt 2014-2016 | Góðskutap 2014-2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Blk.1.2:** | | | | | | | | | | |
| | 1 | 8,31 | 4.516 | 8,69 | 1.549 | 9,54 | 15.422 | 8,74 | 21.487 | |
| | 2 | 6,80 | 19.022 | 6,38 | 205 | 6,62 | 19.034 | 6,67 | 38.261 | 79.071 |
| | 3 | | | 6,50 | 196 | 6,63 | 1.308 | 6,57 | 1.504 | 3.266 |
| Íalt: | | 7,56 | 23.538 | 7,87 | 1.950 | 7,30 | 35.764 | 7,49 | 61.252 | **82.337** |
| **Blk.2:** | | | | | | | | | | |
| | 1 | 10,93 | 59.796 | 10,99 | 40.915 | 9,54 | 17.875 | 10,71 | 118.586 | |
| | 2 | 10,66 | 69.712 | 10,06 | 47.884 | 10,64 | 41.727 | 10,45 | 159.323 | 40.548 |
| | 3 | 9,93 | 11.471 | 10,32 | 214.902 | 10,02 | 92.810 | 10,15 | 319.183 | 178.146 |
| | 4 | 11,30 | 24.693 | 8,87 | 9.419 | 9,42 | 14.666 | 10,02 | 48.778 | 33.516 |
| | 5 | 9,36 | 41.449 | 10,46 | 66.055 | 9,65 | 963 | 9,97 | 108.467 | 80.046 |
| | 6 | 8,96 | 65.769 | 10,65 | 85.273 | 9,99 | 106.367 | 9,88 | 257.409 | 214.022 |
| | 7 | 10,11 | 93.501 | 10,47 | 60.381 | 8,48 | 46.433 | 9,87 | 200.315 | 168.829 |
| | 8 | 10,81 | 101.608 | 10,17 | 78.265 | 7,75 | 38.656 | 9,78 | 218.529 | 202.600 |
| | 9 | 10,37 | 96.822 | 9,65 | 55.777 | 8,30 | 45.866 | 9,70 | 198.465 | 199.424 |
| | 10 | 10,54 | 102.419 | 9,87 | 70.762 | 7,81 | 38.172 | 9,58 | 211.353 | 238.670 |
| | 11 | 9,72 | 64.760 | 9,68 | 82.149 | 8,13 | 37.137 | 9,29 | 184.046 | 261.276 |
| | 12 | 10,73 | 6.960 | 8,28 | 4.798 | 8,04 | 6.093 | 9,25 | 17.851 | 26.089 |
| | 13 | 9,77 | 68.133 | 9,34 | 86.603 | 8,24 | 38.765 | 9,16 | 193.501 | 299.019 |
| | 14 | 7,63 | 13.872 | 9,48 | 15.287 | 7,05 | 3.414 | 8,27 | 32.573 | 79.318 |
| | 15 | 11,17 | 6.014 | 7,23 | 3.587 | 6,82 | 9.586 | 7,71 | 19.187 | 57.556 |
| Íalt: | | 10,10 | 826.979 | 10,07 | 922.057 | 9,05 | 538.530 | 9,78 | 2.287.566 | **2.079.058** |
| **Blk.3:** | | | | | | | | | | |
| | 1 | 14,04 | 67.566 | 15,27 | 154.424 | 13,65 | 206.784 | 14,45 | 428.774 | |
| | 2 | 14,25 | 325.248 | 14,54 | 251.474 | 12,99 | 216.583 | 14,00 | 793.305 | 359.977 |
| | 3 | 12,98 | 363.830 | 14,60 | 328.720 | 13,24 | 297.575 | 13,66 | 990.125 | 781.002 |
| | 4 | 11,45 | 29.642 | 13,47 | 46.823 | 11,11 | 46.490 | 12,38 | 122.955 | 254.592 |
| | 5 | 11,37 | 162.569 | 12,63 | 148.965 | 11,52 | 161.219 | 11,82 | 472.753 | 1.242.952 |
| | 6 | 11,36 | 988.152 | 12,10 | 970.254 | 10,87 | 259.979 | 11,63 | 2.218.385 | 6.270.327 |
| | 7 | 11,44 | 304.536 | 11,99 | 562.563 | 11,15 | 312.695 | 11,55 | 1.179.794 | 3.430.347 |
| | 8 | 10,70 | 552.639 | 11,90 | 614.352 | 11,60 | 641.980 | 11,39 | 1.808.971 | 5.536.507 |
| | 9 | 10,68 | 760.848 | 11,96 | 817.232 | 11,25 | 715.501 | 11,34 | 2.293.581 | 7.130.952 |
| | 10 | 10,43 | 739.209 | 12,07 | 714.392 | 11,02 | 546.434 | 11,20 | 2.000.035 | 6.512.494 |
| Íalt: | | 11,35 | 4.294.239 | 12,50 | 4.609.199 | 11,60 | 3.405.240 | 11,86 | 12.308.678 | **31.519.150** |
| **Blk. 4A:** | | | | | | | | | | |
| | 1 | 13,87 | 4.130 | 13,68 | 10.772 | 13,03 | 11.883 | 13,41 | 26.785 | |
| | 2 | 12,82 | 167.076 | 13,47 | 236.667 | 13,52 | 138.680 | 13,29 | 542.423 | 69.490 |
| | 3 | 12,41 | 174.351 | 13,53 | 162.776 | 13,36 | 104.076 | 13,06 | 441.203 | 155.682 |
| | 4 | 12,72 | 1.362 | 12,14 | 425 | 13,13 | 1.107 | 12,74 | 2.894 | 1.955 |
| | 5 | 10,81 | 1.714 | 11,55 | 695 | 11,97 | 6.418 | 11,61 | 8.827 | 15.927 |
| Íalt: | | 12,60 | 348.633 | 13,49 | 411.335 | 13,31 | 262.164 | 13,15 | 1.022.132 | **243.054** |
| **Blk. 4b:** | | | | | | | | | | |
| | 1 | 13,36 | 175.571 | 13,69 | 264.360 | 13,68 | 172.209 | 13,59 | 612.140 | |
| | 2 | 12,94 | 44.783 | 13,81 | 202.214 | 12,92 | 142.692 | 13,37 | 389.689 | 86.572 |
| | 3 | 12,43 | 224.545 | 12,86 | 171.412 | 12,88 | 105.926 | 12,67 | 501.883 | 459.685 |
| | 4 | 12,01 | 545.251 | 13,21 | 526.584 | 12,31 | 286.134 | 12,55 | 1.357.969 | 1.415.143 |
| | 5 | 11,94 | 288.790 | 13,39 | 333.396 | 11,78 | 209.791 | 12,39 | 831.977 | 997.624 |
| Íalt: | | 12,56 | 1.278.940 | 13,40 | 1.497.966 | 12,87 | 916.752 | 12,99 | 3.693.658 | **2.959.023** |
| **Blk. 4T:** | | | | | | | | | | |
| | 1 | 10,48 | 86.217 | 12,89 | 86.526 | 11,78 | 138.021 | 11,81 | 310.764 | |
| | 2 | 10,86 | 215.852 | 12,25 | 231.498 | 11,51 | 322.880 | 11,54 | 770.230 | 208.773 |
| | 3 | 10,48 | 207.122 | 12,41 | 216.566 | 11,86 | 223.853 | 11,53 | 647.541 | 179.626 |
| | 4 | 10,49 | 161.193 | 12,21 | 208.560 | 11,68 | 229.055 | 11,49 | 598.808 | 192.203 |

| | 2014 Kr/kg & Kg. ialt | | 2015 Kr/kg & Kg. ialt | | 2016 Kr/kg & Kg. ialt | | Vektað Miðal (kr/kg) | Kg. ialt 2014-2016 | Góðskutap 2014-2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5 | 10,59 | 102.012 | 11,74 | 172.595 | 11,64 | 130.564 | 11,29 | 405.171 | 211.584 |
| 6 | 10,44 | 228.370 | 12,13 | 224.308 | 11,06 | 412.106 | 11,19 | 864.784 | 535.504 |
| Íalt: | 10,56 | 1.000.766 | 12,24 | 1.140.053 | 11,57 | 1.456.479 | 11,46 | 3.597.298 | **1.327.689** |
| **Blk. 5A:** | | | | | | | | | |
| 1 | 13,78 | 281.335 | 15,26 | 243.029 | 14,92 | 165.964 | 14,63 | 690.328 | |
| 2 | 13,13 | 163.913 | 14,99 | 152.215 | 15,24 | 148.022 | 14,43 | 464.150 | 91.292 |
| 3 | 13,20 | 25.912 | 14,25 | 14.134 | 15,43 | 23.910 | 14,14 | 63.956 | 31.208 |
| 4 | 13,73 | 148.797 | 14,41 | 160.643 | 14,00 | 120.525 | 14,08 | 429.965 | 237.782 |
| 5 | 12,74 | 26.285 | 14,18 | 24.683 | 14,42 | 31.214 | 13,77 | 82.182 | 70.807 |
| 6 | 12,98 | 60.829 | 13,72 | 60.522 | 14,33 | 35.424 | 13,58 | 156.775 | 164.596 |
| 7 | 12,28 | 61.370 | 13,85 | 71.779 | 13,90 | 61.314 | 13,39 | 194.463 | 240.478 |
| 8 | 12,59 | 19.532 | 13,28 | 19.340 | 14,20 | 12.546 | 13,25 | 51.418 | 71.077 |
| 9 | 12,23 | 124.123 | 13,00 | 124.775 | 12,97 | 92.050 | 12,73 | 340.948 | 648.749 |
| 10 | 11,78 | 7.657 | 12,94 | 17.570 | 12,67 | 20.327 | 12,59 | 45.554 | 93.123 |
| 11 | 11,84 | 76.505 | 13,05 | 69.628 | 13,00 | 40.300 | 12,58 | 186.433 | 381.753 |
| 12 | 11,32 | 14.863 | 13,06 | 36.310 | 12,70 | 20.181 | 12,52 | 71.354 | 150.921 |
| 13 | 12,06 | 69.699 | 12,47 | 54.514 | 13,41 | 35.872 | 12,46 | 160.085 | 347.550 |
| 14 | 11,76 | 83.003 | 12,69 | 53.216 | 14,22 | 11.396 | 12,38 | 147.615 | 331.969 |
| 15 | 11,71 | 18.600 | 12,46 | 35.959 | 12,31 | 19.403 | 12,17 | 73.962 | 182.101 |
| 16 | 11,12 | 21.363 | 12,69 | 11.850 | 13,54 | 11.523 | 12,16 | 44.736 | 110.325 |
| 17 | 11,12 | 37.026 | 12,55 | 18.032 | 14,09 | 9.724 | 12,09 | 64.782 | 164.395 |
| 18 | 11,51 | 33.765 | 12,31 | 27.230 | 12,57 | 24.993 | 12,05 | 85.988 | 222.076 |
| 19 | 10,13 | 8.581 | 13,00 | 27.721 | 11,78 | 36.205 | 11,94 | 72.507 | 195.200 |
| 20 | 11,79 | 35.022 | 12,13 | 35.221 | 11,84 | 29.174 | 11,94 | 99.417 | 267.785 |
| 21 | 11,14 | 88.196 | 12,83 | 29.347 | 11,45 | 42.394 | 11,79 | 159.937 | 454.583 |
| 22 | 10,75 | 34.531 | 12,21 | 5.295 | 10,35 | 12.119 | 10,87 | 51.945 | 195.223 |
| Íalt: | 12,33 | 1.440.907 | 13,47 | 1.293.013 | 13,60 | 1.004.580 | 13,09 | 3.738.500 | **4.652.991** |
| **Blk. 5B:** | | | | | | | | | |
| 1 | | | 13,41 | 1.008 | 14,49 | 9.412 | 14,33 | 10.420 | |
| 2 | 13,03 | 1.490 | 13,67 | 2.596 | 14,31 | 7.019 | 13,89 | 11.105 | 4.886 |
| 3 | 12,76 | 10.180 | 14,10 | 11.523 | 13,99 | 5.488 | 13,59 | 27.191 | 20.108 |
| 4 | 12,28 | 5.239 | 13,56 | 4.065 | 14,77 | 3.215 | 13,46 | 12.519 | 10.979 |
| 5 | 12,51 | 10.281 | 13,86 | 7.618 | 14,24 | 4.566 | 13,35 | 22.465 | 22.111 |
| 6 | 14,53 | 2.753 | 12,71 | 3.723 | 12,54 | 5.587 | 13,00 | 12.063 | 16.099 |
| 7 | 12,64 | 94.288 | 13,26 | 100.997 | 13,81 | 56.298 | 13,14 | 251.583 | 300.658 |
| 8 | | | | | 13,23 | 9.414 | 13,23 | 9.414 | 10.384 |
| 9 | | | 15,21 | 1.482 | 11,14 | 14.735 | 11,77 | 16.217 | 41.582 |
| 10 | 13,27 | 2.387 | 13,08 | 4.527 | 13,14 | 6.468 | 13,15 | 13.382 | 15.874 |
| 11 | 10,35 | 29.876 | 14,65 | 46.082 | 14,07 | 54.195 | 13,33 | 130.153 | 130.281 |
| 12 | | | 12,70 | 2.335 | 13,16 | 5.056 | 12,99 | 7.391 | 9.924 |
| 13 | 11,97 | 1.613 | 13,27 | 1.719 | 13,37 | 11.982 | 13,10 | 15.314 | 18.930 |
| 14 | 11,98 | 7.833 | 14,00 | 7.745 | 12,56 | 6.197 | 12,81 | 21.775 | 33.263 |
| 15 | 12,03 | 58.195 | 13,53 | 46.439 | 12,96 | 37.066 | 12,79 | 141.700 | 218.785 |
| 16 | 12,03 | 17.227 | 13,39 | 31.954 | 13,09 | 23.710 | 12,92 | 72.891 | 102.687 |
| 17 | 12,26 | 21.801 | 13,47 | 26.665 | 12,62 | 23.971 | 12,83 | 72.437 | 108.616 |
| 18 | | | 12,49 | 13.378 | 13,00 | 27.800 | 12,75 | 41.178 | 65.145 |
| 19 | 13,35 | 913 | 12,03 | 13.526 | 12,85 | 37.525 | 12,57 | 51.964 | 91.463 |
| 20 | 13,92 | 5.304 | 11,89 | 13.843 | 12,32 | 4.436 | 12,38 | 23.583 | 46.157 |
| 21 | 11,96 | 23.954 | 12,52 | 15.193 | 13,33 | 9.885 | 12,44 | 49.032 | 92.816 |
| 22 | | | 12,43 | 14.760 | 12,72 | 17.446 | 12,57 | 32.206 | 56.696 |
| 23 | 11,47 | 22.151 | 13,09 | 20.738 | 12,92 | 17.996 | 12,49 | 60.885 | 112.485 |
| 24 | 11,81 | 17.477 | 13,31 | 15.503 | 12,27 | 14.694 | 12,56 | 47.674 | 84.595 |
| 25 | 11,05 | 7.447 | 12,94 | 9.650 | 13,29 | 5.588 | 12,39 | 22.685 | 44.026 |
| 26 | 12,38 | 4.727 | 13,31 | 5.817 | 11,58 | 2.768 | 12,65 | 13.312 | 22.342 |
| 27 | 12,53 | 3.391 | 12,49 | 8.589 | 12,12 | 9.081 | 12,32 | 21.061 | 42.393 |
| 28 | 11,15 | 6.666 | 13,38 | 4.473 | 12,57 | 6.946 | 12,26 | 18.085 | 37.548 |
| 29 | 11,62 | 614.702 | 12,72 | 803.108 | 12,53 | 841.604 | 12,35 | 2.259.414 | 4.489.678 |
| 30 | | | 12,06 | 13.656 | 12,49 | 44.410 | 12,41 | 58.066 | 111.901 |
| 31 | 11,90 | 24.255 | 12,72 | 26.119 | 12,14 | 19.482 | 12,27 | 69.856 | 143.950 |

| | 2014 Kr/kg & Kg. íalt | | 2015 Kr/kg & Kg. íalt | | 2016 Kr/kg & Kg. íalt | | Vektað Miðal (kr/kg) | Kg. íalt 2014-2016 | Góðskutap 2014-2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 32 | | | 12,05 | 7.708 | 12,35 | 8.156 | 12,21 | 15.864 | 33.731 |
| 33 | 12,06 | 5.131 | 11,99 | 11.129 | 12,48 | 3.575 | 12,13 | 19.835 | 43.633 |
| 34 | 11,31 | 8.596 | 12,47 | 6.930 | 12,73 | 9.590 | 12,17 | 25.116 | 54.320 |
| 35 | 10,65 | 1.866 | 13,11 | 3.481 | 12,76 | 7.741 | 12,58 | 13.088 | 22.908 |
| 36 | 11,41 | 10.774 | 12,77 | 2.581 | 12,31 | 11.892 | 12,09 | 25.247 | 56.549 |
| 37 | 12,62 | 11.064 | 10,89 | 2.060 | 12,97 | 14.099 | 12,55 | 27.223 | 48.590 |
| 38 | 10,99 | 1.121 | 13,07 | 10.297 | 12,32 | 15.690 | 12,50 | 27.108 | 49.776 |
| 39 | 12,71 | 3.876 | 12,12 | 4.425 | 11,38 | 7.042 | 11,84 | 15.343 | 38.225 |
| 40 | 11,43 | 2.621 | 12,09 | 8.268 | 12,47 | 7.699 | 12,09 | 18.588 | 41.692 |
| 41 | 10,76 | 5.527 | 13,01 | 6.487 | 12,22 | 4.012 | 12,01 | 16.026 | 37.295 |
| 42 | 11,44 | 11.970 | 12,58 | 21.607 | 11,87 | 19.195 | 12,05 | 52.772 | 120.477 |
| 43 | 10,89 | 27.290 | 12,66 | 31.090 | 12,31 | 24.000 | 11,95 | 82.380 | 196.250 |
| 44 | 12,22 | 1.754 | 11,41 | 2.755 | 12,16 | 15.325 | 12,00 | 19.834 | 46.203 |
| 45 | 11,26 | 15.727 | 12,18 | 15.636 | 12,13 | 11.892 | 11,87 | 43.255 | 106.612 |
| 46 | 10,88 | 3.536 | 12,48 | 6.241 | 12,19 | 7.676 | 12,03 | 17.453 | 40.135 |
| 47 | 11,01 | 7.691 | 12,63 | 17.572 | 11,82 | 7.064 | 11,95 | 32.327 | 77.122 |
| 48 | 11,53 | 9.350 | 11,49 | 14.919 | 12,33 | 9.708 | 11,73 | 33.977 | 88.337 |
| 49 | 10,95 | 5.539 | 12,57 | 8.991 | 11,51 | 7.559 | 11,76 | 22.089 | 56.748 |
| 50 | 11,03 | 2.851 | 11,69 | 6.510 | 12,30 | 24.231 | 12,02 | 33.592 | 77.621 |
| 51 | | | 12,46 | 27.144 | 10,87 | 4.773 | 12,12 | 31.917 | 70.758 |
| 52 | 10,31 | 10.417 | 12,22 | 8.810 | 12,26 | 11.571 | 11,58 | 30.798 | 84.847 |
| 53 | 11,62 | 2.125 | 11,93 | 11.028 | 11,22 | 5.115 | 11,70 | 18.268 | 48.133 |
| 54 | 10,53 | 4.443 | 11,77 | 12.774 | 12,40 | 9.776 | 11,80 | 26.993 | 68.275 |
| 55 | 11,05 | 20.364 | 12,02 | 18.169 | 11,61 | 16.001 | 11,60 | 54.534 | 149.281 |
| 56 | 10,52 | 10.383 | 12,11 | 6.473 | 11,96 | 8.635 | 11,51 | 25.491 | 71.925 |
| 57 | 10,56 | 24.639 | 12,27 | 16.632 | 11,66 | 24.081 | 11,39 | 65.352 | 192.054 |
| 58 | 11,06 | 10.473 | 12,28 | 18.739 | 10,92 | 13.894 | 11,54 | 43.106 | 120.488 |
| 59 | 10,68 | 5.368 | 11,30 | 3.908 | 11,32 | 3.535 | 11,06 | 12.811 | 41.884 |
| 60 | 10,08 | 10.597 | 11,77 | 12.410 | 11,36 | 17.228 | 11,11 | 40.235 | 129.492 |
| 61 | 8,41 | 161 | 11,41 | 2.611 | 13,05 | 8.413 | 12,11 | 11.185 | 24.857 |
| Íalt: | 11,62 | 614.702 | 12,72 | 803.108 | 12,53 | 841.604 | 12,35 | 2.259.414 | **8.744.581** |

| | |
|---|---|
| **Góðskutap íalt yvir 3 ár (2014-2016) - sølur á FMF:** | **51.607.884** |

## Fylgiskjal 2: Grafiskar samanberingar innan hvønn skipabólk.

Sí powerpoint framløgu...